## KUNNGERÐ UM TELEFONIR OG AVGREIÐSLUTÍÐIR HJÁ SEV

Frá 2. januar 2003 verða øll fýra telefonnumrini á skrivstovum okkara í Tórshavn, Klaksvík, Vestmanna og í Vági strikað.
Ístaðin fæst fatur á øllum skrivstovunum við at ringja á Tlf. nr. 34 6800.

Avgreiðslutíðirnar verða frá 2. januar 2003 allar vanligar arbeiðsdagar mánadag til fríggjadag kl. 900 til 1600.
Vakt okkara svarar alt døgnið uttanfyri nevndu avgreiðslutíðir. Vaktin tekur sær bert av viðurskiftum, sum ikki tola at bíða til næsta arbeiðsdag, sum t.d. streymslit.

SEV

Tórshavn, tann 16. desember 2002.
Elfelagið SEV



## KUNNGERÐ UM AFTURLATINGARTÍÐIR OG VAKTARHALD HJÁ SEV UM JÓLINI OG ÁRSSKIFTIÐ

Gjørt verður kunnugt, at allar skrivstovur hjá SEV eru stongdar frá fríggjadagin tann 20. desember 2002 kl. 1600 til 2. januar 2003 kl. 0800, og at øll linjuarbeiðir o.a. sum tola at bíða, verður steðgað í sama tíðarskeiði.
Vit hava vakt alt døgnið. Til ber at fáa fatur á vaktini á tlf. nr. 311366 í nevnda tíðarskeiði.
Vaktin tekur sær bert av viðurskiftum, sum ikki tola at bíða, sum t.d. streymslit.

SEV

Tórshavn, tann 16. desember 2002.
Elfelagið SEV



Mustad

Jólini 2002

Við ynskjum um eini gleðilig jól og gott nýggjár

Poul Andr. Mikladal
Tel: 21 82 70
Email: poul@kjolbro.com

J. F. Kjølbro Heilsøla P/f • Stangavegur 3 • 700 Klaksvík
Tel: 47 11 16 • Fax: 47 11 00 • www.kjolbro.com









# Mannamúgva tók ímóti jólamonnunum

**Mikudagin komu jólamenninir til Havnar. Ein av teimum kom við jólaskipinum, ein stóð á keiini og tók ímóti, meðan tann triðji lá og svav í einum lítlum húsum uppi í Grasagarði**

JÓLASTÁKAN
*Ingrid Bjarnastein*

Við jólaskipinum mikudagin var ein jólamaður. Hann hevði júst verið í Nólsoy og vitjað børnini har úti. Tá hann kom í land í Havn, var teir báðir jólamenninir, sum búgva á Húsareyni og Kirkjubøreyni og tóku ímóti honum, saman við eini stórari mannamúgvu av børnum og vaksnum.

GHM spældi jólaløg, meðan jólamenninir býttu karamellur og sleikisneisir út til børnini. Ætlanin var at fáa børnini at syngja við tá GHM spældi, men børnini hoyrdu als ikki jólamenninar syngja, so tað riggaði ikki rættiliga.

Tá jólamennirnir vóru lidnir við at býta góðgæti út niðri í Vágsbotni, fóru teir víðari niðan í Grasagarð. Har lá ein annar jólamaður og svav í lítlu húsunum, sum har standa. Hann hevði eisini eina stóra goymslu av sleikisneisum og karamellum til børnini. Har var eisini skipað fyri livandi krubbuspæli.

Aftaná spældi GHM aftur í gongugøtuni, meðan jólamenninir gingu runt og góvu børnunum góðgæti.

Frá Kunningarstovuni í Havn siga tey, at tey eru sera væl nøgd við tiltakið. Ein rúgva av fólki møtti upp, og saman fingu tey øll eina hugnaliga løtu.






HAVNAR BIO
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo




| | | | |
|---|---|---|---|
| Leygardagin 21.12. kl. 18³⁰ | | Leygardagin 21.12.kl. 22¹⁵ | |
| Sunnudagin 22.12. kl. 18³⁰ | | Sunnudagin 22.12.kl. 22¹⁵ | |

DEN HELT STORE FAMILIEFILM




| | |
|---|---|
| Leygardagin 21.12. kl. $16^{30}$ | Leygardagin 21.12.kl. $18^{00}$ |
| Sunnudagin 22.12. kl. $16^{30}$ | Sunnudagin 22.12.kl. $18^{00}$ |
| Mánadagin 23.12. kl. $16^{30}$ | Mánadagin 23.12.kl. $18^{00}$ |
| 2. jóladag 26.12. kl. $16^{00}$ | 2. jóladag 26.12.kl. $17^{00}$ |
| Fríggjadagin 27.12. kl. $16^{00}$ | Fríggjadagin 27.12.kl. $17^{00}$ |




| | |
|---|---|
| Leygardagin 21.12. kl. $20^{15}$ | Sunnudagin 22.12.kl. $20^{15}$ |
| Mánadagin 23.12. kl. $20^{15}$ | 2. jóladag 26.12.kl. $19^{00}$ |
| Fríggjadagin 27.12. kl. $19^{00}$ | |




| | |
|---|---|
| Leygardagin 21.12. kl. $22^{45}$ | Sunnudagin 22.12.kl. $22^{45}$ |
| Mánadagin 23.12. kl. $22^{45}$ | 2. jóladag 26.12.kl. $21^{15}$ |
| Fríggjadagin 27.12. kl. $21^{15}$ | |

KOMANDI FILMUR




Frumsýning
2. jóladag 26.12. kl. $23^{30}$
Fríggjadagin 27.12. kl. $23^{30}$

HAVNAR BIO & BIO KIOSKIN
ynskja viðskiftafólkum sínum eini gleðilig jól

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu